





FOÍB-fundur í Aberdeen:

# Stórar avbjóðingar fyri framman

**-Vit standa framvegis yvir fyri stórum avbjóðingum í leitingini á landgrunninum og enn er stutt frálíðið í hesi tilgongd. Stór óvissa er eisini knýtt at framtíðar møguleikum. Kortini skal FOÍB virka fyri at loysa ósvaraðu spurningarnar. Vónandi kunnu vit síggja fram til komandi útbjóðingar og eitt samstarv við føroyskar myndugleikar og ídnaðin, sum fer at vara langt inn í framtíðina sigur Ben Arabo formaður í FOÍB**


*Orð og myndir:*
*Jan Müller*
*Jan@sosialurin.fo*


Áhugafelagsskapurin hjá oljufeløgunum, sum eru virkin á føroyska landgrunninum, høvdu fund í Aberdeen í farnu viku, nú oljumessa varð hildin í býnum. Talan er um FOÍB, sum umboðar áhugamálini hjá feløgunum. Á fundinum vóru umboð fyri BP, Statoil, Amerada Hess, Føroya Kolvetni, Atlants Kolvetni og Anadarko. Í felagsskapinum eru so eisini Dong, Petro Canada, Phillips og BG. Eisini Atlanticon, sum tekur sær av fyrisitingini av felagsskapinum var við á fundinum. Í hesum sambandi hevur FOÍB nú latið úr hondum sína fyrstu veruliga ársfrágreiðing, sum í stuttum greiðir frá virkseminum hjá felagsskapinum í farna ári og annars trívur í virksemi síðani felagið varð stovnað fyri umleið tveimum árum síðani.



*Umboð fyri oljufeløgini, sum virka í Føroyum, eftir fund í einum av undirbólkunum í FOIb í Aberdeen í farnu viku. Frv. Regin Hammer, skrivari, Ben Arabo, formaður, Niels Sørensen, Hjarnar Djurhuus, Johan Mortensen, Rúni Hansen og Vilhelm Petersen*



*Ben Arabo, formaður í FOÍB*

Í ársfrágreiðingini skrivar Ben Arabo, formaður í FOÍB m.a., at hóast tað í løtuni hevur stóran týdning at bora brunnar á landgrunninum, so er tað eisini sera umráðandi at arbeiða við eini ætlan uppá longri sikt. Hann sigur, at tað hevur alstóran týdning í hesi tilgongd at skilja allar tættir í sambandi við umhvørvi og trygd. Teir ymsu undirbólkarnir í FOÍB skulu vera við til at tryggja hesa tilgongd. Endamálið er at fáa vísindaliga vitan til vega, sum kann loysa upp fyri møguleikanum at finna olju og gass í føroysku undirgrundini.

-Vit standa framvegis yvir fyri stórum avbjóðingum í leitingini á landgrunninum og enn er stutt frálíðið í hesi tilgongd. Stór óvissa er eisini knýtt at framtíðar møguleikum. Kortini skal FOÍB virka fyri at loysa ósvaraðu spurningarnar. Vónandi kunnu vit síggja fram til komandi útbjóðingar og eitt samstarv við føroyskar myndugleikar og ídnaðin, sum fer at vara langt inn í framtíðina skrivar Ben Arabo.

Í frágreiðingini eru nágreiniligir upplýsingar um 1. Útbjóðingina og um tær verkætlanir, sum hava verið gjørdar undir FOÍB regi, eitt nú Sindri, sum m.a. hevur til uppgávu at loysa basaltgátuna. Har er so eisini frágreiðing um arbeiði í øllum undirbólkunum.

At enda í frágreiðingini er yvirlit yvir pengarnar, sum feløgini í FOÍB hava játtað og brúkt til virksemi í Føroyum og aðrastaðni. Ein uppgerð vísir, at FOÍB hevur brúkt umleið 14 mill. kr. hesi bæði seinastu árini. Uppgerðin vísir eisini, at meðan FOÍB í 2001 brúkti 18% av upphæddini í Føroyum millum føroyskar veitarar, so var hetta talið í 2002 58%. Hetta verður helst eisini galdandi fyri 2003.

| Lincence no | Blocks/part blocks | Companies | Share | Area | Period |
|---|---|---|---|---|---|
| 001 | 6005/20, and 25, and 6004/16 | Amerada Hess<br>British Gas<br>DONG<br>Atlantic Petroleum | 42.957%<br>39.960%<br>16.983%<br>0.1% | 246 km$^2$ | 6 years |
| 002 | 6004/11, 12, 13, 16, and 17 | Eni<br>Føroya Kolvetni* | 75%<br>25% | 214 km$^2$ | 6 years |
| 003 | 6005/14, 15, 19, 20, and 24, and 6004/16 | Statoil<br>Phillips<br>Enterprise Oil (Shell)**<br>Petro-Canada*** | 35%<br>30%<br>20%<br>15% | 490 km$^2$ | 6 years |
| 004 | 6004/11, and 12, and 6005/15 | BP<br>Shell**** | 67%<br>33% | 284 km$^2$ | 6 years |
| 005 | 6004/1, 2, 3, 6, 7, and 8 | Eni<br>Føroya Kolvetni* | 75%<br>25% | 485 km$^2$ | 9 years |
| 006 | 6105/25, and 30, 6005/ 5, 6104/16, 17, 21, and 26, and 6004/1 | Statoil<br>Anadarko<br>DONG*****<br>Enterprise Oil (Shell)**<br>Petro-Canada*** | 27.5%<br>27.5%<br>20%<br>15%<br>10% | 1.278 km$^2$ | 9 years |
| 007 | 6005/4, 7, 8, 9, 12, 13, and 14 | Anadarko | 100% | 1.217 km$^2$ | 9 years |

* Føroya Kolvetni increased its licence equity from 7% to 25% in June 2003
** In June 2002, Shell took over Enterprise Oil, which holds equity in licences 003 and 006.
*** Petro-Canada took over the licence equity from Veba as per 18 April 2002.
**** Shell farmed into the licence as per July 2001, acquiring equity from BP
***** DONG took over the licence equity from Phillips in September 2002

*Henda talvan vísir loyvini, sum vórðu latin ymsu feløgunum í 2000*

## Fakta

FOÍB stendur fyri Føroya Oljuídnaðarbólkur – á enskum FOIB, Faroese Oil Industry Group.

Felagsskapurin varð stovnaður í 2001, eftir at stóri felagsskapurin GEM varð niðurlagdur eftir nógv ára arbeiði, serliga á umhvørvisøkinum. Ætlaninn er at halda fram við uppgávunum, sum GEM hevði og at átaka sær enn fleiri uppgávur.

Við í felagsskapinum eru tey 12 feløgini, sum fingu leitiloyvi í 2000. Hesi eru : BP, Shell, Statoil, Amerada Hess, Anadarko, Føroya Kolvetni, PetroCanada, Phillips, Dong, Eni, Atlants Kolvetni og BG.

Felagsskapurin skal byggja brýr millum oljufeløgini og myndugleikarnar og millum feløginin sínámillum. Felagsskapurin fevnir um flestu greinar, ið oljufeløgini takast við, frá umhvørvi til trygd, frá leiting til jarðfrøðilig viðurskifti og handilsligar spurningar.

Endamálið hjá felagsskapinum er at varðveita og økja um vitanina um føroyska økið fyri harvið at skapa grundarlag undir einum komandi oljuídnaði í Føroyum. Stórur dentur verður lagdur á samskifti og dialog við føroyskar myndugleikar og vinnulív og samfelagið annars.